**Bárður Kass Nielsen** **Nr. 52/2018**
**løgtingsmaður**

**Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a**

**Fyrispurningur um Íslandskvotuna hjá línuflotanum, settur landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, Høgna Hoydal (at svara skrivliga eftir TS § 52a)**

1. Nær kann man vænta, at fiskiveiðuavtalan við Ísland fyri árið 2019 er komin uppá pláss?
2. Hvussu metir landsstýrismaðurin, at politiska støðan er millum grannalondini Føroyar og Ísland í dag?
3. Hvørjar fylgjur vil tað fáa fyri føroyska línuflotan, um hesi skip ikki sleppa í íslendskan sjógv at fiska sína Íslandskvotu í ár?

**Viðmerkingar:**
Føroyski línuflotin er minkaður nógv, og úrslitini í hesum skipabólki hava verið sera misjøvn seinastu nógvu árini. Tíbetur hevur tað eydnast nøkrum línuskipum at vinna sær atgongd til m.a. Flemish Cap, grønlendskan og íslendskan sjógv ávísar partar av árinum. Hesi rættindi hava givið eitt gott og sera kærkomið íkast til fíggjarliga raksturin av skipunum.

Seinastu árini hava línuskipini fiskað umleið 5.600 tons í íslendskum sjógvi árliga, sum svarar til eitt avreiðingarvirði í dagsins kiloprísum uppá uml. 70 mió. kr. Hetta svarar til umleið 30-40% av samlaða umsetninginum hjá føroyska línuflotanum. Tað verður sostatt ein sannur smeitur fyri línuskipini, um tey ikki sleppa í íslendskan sjógv í ár. Ein smeitur sum kemur at hava ógvusligar avleiðingar hjá einum frammanundan ógvuliga sperdum skipabólki.

Harafturat kann væntast, at um skipini ikki sleppa í íslendskan sjógv í ár, koma tey at brúka nógv fleiri fiskidagar í føroyskum sjógvi í staðin. Veiðitrýstið á føroysku grunnarnar vil tí koma at økjast munandi, hóast tilmælini frá myndugleikunum eru, at trýstið ikki eigur at økjast. Tí verða hesir spurningar settir.

**Á Løgtingi, 21. februar 2019**

Bárður Kass Nielsen